FM fyri lið:

# Favorittarnir víðari

**Seinastu umførini í innleiðandi kappingini vóru leikt í Bridgehúsinum í Havn um vikuskiftið, og favorittarnir fóru víðari**

BRIDGE
*Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen*



*Vinnararnir av 2. deild. F.v. Oddmar Danielsen, Jórun Johannesen, Johannes Skaarup, Maria Christiansen og Einar Ellingsgaard*

Í 1. deild hendi einki óvæntað. Tey fýra liðini, ið hava ligið fremst allan veturin, hildu støðuna og skulu í mai mánaða til Klaksvíkar at leika finalu umfar um FM heitið. Liðini hava í finalu umfarinum helvtina av innanhýsisstigunum við sær.

Størri var spenningurin í 2. deild. Tá seinasta stikk var tikið í Bridgehúsinum sunnukvøldið var greitt, at liðið hjá Jórun Johannesen hevði vunnið 2. deild, og sostatt er flutt upp í 1. deild komandi ár. Tey vunnu í síðsta enda við hampuliga stórum muni, men spenningurin var stórur til tað síðsta. Hvat lið flytir upp í 1. deild saman við Jórun verður avgjørt í Klaksvík í mai, tá tey bæði aftastu liðini í 1. deild í bólki saman við nr 2 og 3 í 2. deild skulu leika um hitt uppflytingarplássið.

## Úrslit og støður:

**Bridgehúsið Tórshavn**

*Umfar 7 – Fríggjadag 1. mars kl 19.30*

1.deild

| | |
|---|---|
| Allan Dal Christiansen — Jóna Grunnveit | 21-09 |
| Símin Lassaberg — Junior Buss Taxa | 14-16 |
| Hanus Bærentsen — Carl Mikkelsen | 06-24 |

2.deild

| | |
|---|---|
| Hallur Ellingsgaard — Danny Transport | 20-10 |
| Øssur Winthereig — Jórun Johannesen | 08-22 |
| Eyðun Jakobsen — Hans Egil Joensen | 04-25 |
| John Reid Skoralíð — Álvur Klakk | 07-23 |

*Umfar 8 – Leygardag 2. mars Kl 10.00*

1.deild

| | |
|---|---|
| Carl Mikkelsen — Allan Dal-Christiansen | 13-17 |
| Junior Buss Taxa — Jóna Grunnveit | 19-11 |
| Símin Lassaberg — Hanus Bærentsen | 19-11 |

2.deild

| | |
|---|---|
| John Reid Skoralíð — Hallur Ellingsgaard | 18-12 |
| Hans Egil Joensen — Øssur Winthereig | 14-16 |
| Álvur Klakk — Danny Transport | 20-10 |
| Eyðun Jakobsen — Jórun Johannesen | 05-25 |
| Hallur Ellingsgaard — Hans Egil Joensen | 14-16 |
| Øssur Winthereig — Álvur Klakk | 09-21 |
| Danny Transport — Eyðun Jakobsen | 15-15 |
| Jórun Johannesen — John Reid Skoralíð | 19-11 |

*Umfar 9 – Leygardag 3. mars kl 14.50*

1.deild

| | |
|---|---|
| Allan Dal-Christiansen — Símin Lassaberg | 14-16 |
| Hanus Bærentsen — Junior Buss Taxa | 12-18 |
| Jóna Grunnveit — Carl Mikkelsen | 04-25 |

2.deild

| | |
|---|---|
| Álvur Klakk — Hallur Ellingsgaard | 13-17 |
| Eyðun Jakobsen — Øssur Winthereig | 07-23 |
| John Reid Skoralíð — Danny Transport | 16-14 |
| Hans Egil Joensen — Jórun Johannesen | 13-17 |
| Hallur Ellingsgaard — Eyðun Jakobsen | 14-16 |
| Øssur Winthereig — John Reid Skoralíð | 22-08 |
| Danny Transport — Hans Egil Joensen | 08-22 |
| Jórun Johannesen — Álvur Klakk | 13-17 |

*Umfar 10 – Sunnudag 3. mars kl 14.00*

1.deild

| | |
|---|---|
| Junior Buss Taxa — Allan Dal-Christiansen | 18-12 |
| Carl Mikkelsen — Símin Lassaberg | 02-25 |
| Jóna Grunnveit — Hanus Bærentsen | 23-07 |

2.deild

| | |
|---|---|
| Øssur Winthereig — Hallur Ellingsgaard | 07-23 |
| Jórun Johannesen — Danny Transport | 07-23 |
| Hans Egil Joensen — John Reid Skoralíð | 18-12 |
| Eyðun Jakobsen — Álvur Klakk | 08-22 |
| Hallur Ellingsgaard — Jórun Johannesen | 12-18 |
| Danny Transport — Øssur Winthereig | 15-15 |
| John Reid Skoralíð — Eyðun Jakobsen | 13-17 |
| Álvur Klakk — Hans Egil Joensen | 20-10 |
| Danny Transport — Hallur Ellingsgaard | 14-16 |
| Jórun Johannesen — Øssur Winthereig | 17-13 |
| Hans Egil Joensen — Eyðun Jakobsen | 19-11 |
| Álvur Klakk — John Reid Skoralíð | 19-11 |

## Endaliga støðan 1. deild

| | |
|---|---|
| 1 Allan Dal-Christiansen | 191 |
| 2 Símin Lassaberg | 188 |
| 3 Junior Buss Taxa | 176 |
| 4 Carl Mikkelsen | 139 |
| 5 Jóna Grunnveit | 95 |
| 6 Hanus Bærentsen | 87 |

## Støðan 1. deild í innanhýsis hálveraðum stigum

| | |
|---|---|
| 1 Símin Lassaberg | 48,5 |
| 2 Allan Dal-Christiansen | 48 |
| 3 Junior Buss Taxa | 48 |
| 4 Carl Mikkelsen | 31,5 |

## Endaliga støðan 2. deild

| | |
|---|---|
| 1 Jórun Johannesen | 260 |
| 2 Hans Egil Joensen | 241 |
| 3 Øssur Winthereig | 227 |
| 4 Álvur Klakk | 226 |
| 5 Hallur Ellingsgaard | 226 |
| 6 Danny Transport | 198 |
| 7 Eyðun Jakobsen | 151 |
| 8 John Reid Skoralíð | 145 |

Liðini, sum skulu spæla um eitt uppflytingarpláss eru: Jóna Grunnveit, Hanus Bærentsen, Hans Egil Joensen og Øssur Winthereig

## Spøl

Vit skulu síggja tvey spøl frá vikuskiftinum. Í báðum spølunum síggja vit, hvat hendir við borðini har Junior Buss Taxa er annar parturin.

Í hesum fyrra spælinum hittast Junior Buss Taxa og Símin Lassaberg.

| | | |
|---|---|---|
| E/A | K543 | |
| | 7 | |
| | Q10764 | |
| | 1085 | |
| QJ986 | | A7 |
| Q10 | | 863 |
| K85 | | AJ32 |
| K62 | | AQJ3 |
| | 102 | |
| | AKJ9542 | |
| | 9 | |
| | 974 | |

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| Árni Dam | Hans J. Petersen | Símin Lassaberg | Arnbjørn Sivertsen |
| - | - | 1ut | pass |
| 2hj | pass | 2sp | pass |
| 3ut | pass | pass | pass |

Útspæl: hjA
EV fingu frið at melda og komu í ta natúrligu kontraktina, 3ut. 2hj var flytimeld til spaðara, og við 3ut vísti Árni, at hann hevði 5 lit í spaðara.

Tað undrar kanska onkran, hví Sunnan ikki meldaði inn í hjartara. Við hini borðini meldaði Sunnan eisini inn, men so komu EV ikki í 3ut. Ein vanlig kontrakt var 4sp, sum vinnur við teimum røttu klípingunum.

Sunnan skuldi nú spæla út ímóti 3ut, og tú kanst helst gita, hvat hann spældi út. Ja, hjA tók fyrsta stikk, og hann steðgaði ikki, fyrr enn hann hevði tikið sjey stikk, so kontraktin fór tríggjar niður.

Spælið gav liðnum hjá Junior Buss Taxa 3 imp. Við hitt borðið, har EV komu í 4sp, hevði Vestan fingið skeiva frágreiðing um merkingina av innmeldinum 2hj. Hetta ørkymlaði hann so mikið, at hann spældi kontraktina tveir niður. Sera óheppið, tí við vanligari spælføring vinnur 4sp lættliga.

Í tí seinna spælinum eru Junior Buss Taxa og liðið hjá Allan Dal-Christiansen í brókatøkum.

| | | |
|---|---|---|
| S/NS | Q | |
| | AK97 | |
| | KJ10753 | |
| | J7 | |
| A874 | | K10953 |
| 1083 | | 6 |
| 2 | | Q84 |
| AK542 | | Q1093 |
| | J62 | |
| | QJ542 | |
| | A96 | |
| | 86 | |

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| Arnbjørn Sivertsen | Heðin Mouritsen | Hans J. Petersen | Jóannes Mouritsen |
| - | - | - | 2hj |
| pass | 4hj | pass | pass |
| pass | | | |

Útspæl: klK
Jóannes pressaði sitrónina við 2hj. Hart meldað við vánaligum 5 liti einsamallur í hættu. Vestan hevur eitt sera torført meld eftir 2hj. Upplýsingardupling við minimum kemur ikki upp á tal við einari singleton í ómeldaðum liti (rútara), og kleyvaraliturin er heldur veikur, so best mundi vera at melda pass og bíða til makkarin upplýsingar-duplaði. Men Norðan meldaði 4hj, og so vóru EV sperraðir úti. Við eitt sindur av hjálp frá mótspælinum - single rútari varð spældur í øðrum stikki, vann Jóannes lættliga kontraktina.

Við hitt borðið helt Rói ikki, at hondin hjá Sunnan var tann rætta at sperra við. EV sluppu inn í meldingarnar og komu í 4sp, sum vórðu duplaðir. Mótspælið fekk trý stikk, og liðið hjá Allani fingu ein rimmar dupult-dekkara, sum gav 16 imp.

## Semi-finala fyri pør

Tann næsta kappingin hjá FBS, FM semifinala fyri pør, verður leygardagin 16. mars kl 13.00 í Bridgehúsinum í Havn. Til hesa kappingina er frí tilmelding. Har verða spæld millum 50 og 75 spøl alt eftir, hvussu nógv pør tekna seg.

FM finalan fyri pør verður leygardagin 20. apríl. Kappingarleiðarin hjá FBS metir, at umleið helvtin av pørunum í semifinaluni koma víðari í finaluna.

Spæligjaldið til semifinaluna er 75 kr fyri hvønn spælara.

## FM kvinnur

Hendan kappingin, sum upprunaliga skuldi verið spæld 17. mars, er útsett til einaferð í mai mánaða. Avgjørt er ikki enn, hvønn dag kappingin verður, men hon verður sama vikuskifti sum tann útsetta FM kappingin fyri veteranar. Vit frætta meir um hetta, so skjótt nakað nýtt er.

## Opið hús

Bridgehúsið hevur opið hús hvønn sunnudag. Byrjað verður nú at spæla kl 15 í staðin fyri kl 14. Spæligjaldið, ið kemur inn, fer til at stuðla EM landsliðnum.




**Roknskapur fyri tíðarskeiðið 1. januar - 31. desember 2001**

RAKSTRARROKNSKAPUR FYRI TÍÐARSKEIÐIÐ 1/1 - 31/12 - 2001

| | tkr. |
|---|---|
| Rentuinntøkur v.m. | 436 |
| Ómaksgjøld og provisiónsinntøkur v.m. | 9.245 |
| Útreiðslur til ómaksgjøld og provisiónir v.m. | -845 |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra v.m. | -2 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 413 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **9.247** |
| Útreiðslur til starvsfólk v.m. og umsiting | -6.608 |
| Avskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum | -301 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | -1.188 |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **1.150** |
| Óvanligar útreiðslur | -137 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **1.013** |
| Skattur | 0 |
| **Ársúrslit** | **1.013** |

FÍGGJARSTØÐA PR. 31/12 - 2001

| | |
|---|---|
| **OGN** | |
| Áogn hjá kredittstovnum v.m. | 5.390 |
| Lánsbrøv v.m. | 500 |
| Partabrøv v.m. | 4.569 |
| Ítøkiligar ognir | 559 |
| Tíðaravmarkingar | 1.104 |
| **OGN TIL SAMANS** | **12.122** |
| **SKULD, EGINPENINGUR OG AVSETINGAR** | |
| Onnur passiv | 442 |
| Tíðaravmarkingar | 321 |
| **Eginpeningur** | |
| Partapeningur | 10.000 |
| Yvirkursgrunnur | 1.914 |
| Flutt úrslit til samans | -555 |
| **Eginpeningur til samans** | **11.359** |
| **SKULD, EGINPENINGUR OG AVSETINGAR TIL SAMANS** | **12.122** |

**VIÐMERKING TIL RAKSTURIN:**
Felagið fekk loyvi at reka virðisbrævameklaravirksemi tann 28. februar 2001. Tí verða eingi samanberingstøl víst.

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag
Tinghúsvegur 14 • FO-110 Tórshavn
tel. 35 1500 • fax 35 1501
www.kaupthing.fo

Skrásetingar nr. P/F 2997



ALVAL

**SØLUFÓLK**

ALVAL søkir eftir sølufólki.

Av tí, at okkara sølumaður fer undir víðari útbúgving, vilja vit hervið søkja eftir nýggjum sølufólki at byrja uml. 1. apríl.

Vit kunnu bjóða tær eitt fjølbroytt og áhugavert starv innan sølu og tænastu til og av vinnulívinum í Suðuroy.
Tú kemur at arbeiða sjálvstøðugt, og kann rokna við at arbeiða uttan fyri vanliga arbeiðstíð eisini.
Starvið umfatar eisini útkoyring og vanliga avgreiðslu. Løn eftir avtalu.

ALVAL er ein minni fyritøka í Suðuroy, sum í høvuðsheitum selur sínur vørur og tænastur til vinnulív og stovnar í oynni.

Vit vænta at umsøkjarir hava eina miðnámsútbúgving, so sum HH ella Student, ella at umsøkjarin hevur relevantar royndir á økinum.

Vil tú hava meira at vita, ber til at venda sær til Poul Midjord Dam: poul@alval.fo, tel. 37 21 86 ella 21 21 86.

Umsókn saman við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. marstø 2002.

**ALVAL**
**FO-827 Øravíkarlíð**



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Skrivari**

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir skrivara til byggi- og býarskipanardeildina at byrja skjótast til ber.

Byggi- og býarskipanardeildin er deild undir teknisku fyrisitingini og hevur m.a. planlegging, byggimál, lendisviðurskifti og kommunalar ognir um hendi.

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið er fjølbroytt, og verða uppgávurnar í høvuðsheitinum hesar:
- skrivari hjá býararkitektinum
- skriva fundarskráir og fundarfrásagnir
- fyrireika tá fundir eru
- taka ímóti og avgreiða boð
- ymiskt skrivstovuarbeiði

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava relevanta skrivstovu-útbúgving, umframt at:
- hava royndir innan skrivstovuarbeiði
- hava góðan kunnleika til EDV
- duga væl føroyskt og danskt, bæði í skrivt og talu, umframt at hava kunnleika til enskt

**Eginleikar**
Tað er umráðandi, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, dugir væl at leggja arbeiðið til rættis, er fyrikomandi og dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og kommunala arbeiðsgevarafelagið, við løn í 3. flokki.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekniska stjóra, ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa á 315160.

**Umsóknir**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. mars 2002. Viðmerk á brævbjálvan "skrivari".

SNARSKIVAN



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Arkitektur**

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir arkitekti til byggi- og býarskipanardeildina at byrja skjótast til ber.

Byggi- og býarskipanardeildin er deild undir teknisku fyrisitingini og hevur m.a. planlegging, byggimál, lendisviðurskifti og kommunalar ognir um hendi.

**Arbeiðsuppgávur**
Viðkomandi verður leiðari á planleggingardeildini, har uppgávurnar í høvuðsheitinum eru:
- útstykkingarætlanir
- byggisamtyktir og lokalplanir
- býarplanlegging
- landslagsplanlegging
- sektorplanlegging
- projerktering og eftirlit
- bygging av kommunalu bygningum

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal verða útbúgvin arkitektur, umframt at:
- hava royndir innan planlegging, projektering og eftirlit, umframt umsiting.
- hava góðan kunnleika til EDV (Microsoft Windows, Word, Excel og Outlook, umframt Cad tekniprogram og/ella MicroStation).
- duga væl føroyskt, bæði í skrivt og talu.
- hava koyrikort.

**Eginleikar**
Tað er umráðandi at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, dugir væl at leggja arbeiðið til rættis, er fyrikomandi og dugir væl at arbeiða saman við starvsfólkunum á deildini.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmálanum millum Arkitektafelagið og Fíggjarmálastýrið, løn og viðbót samb. sáttmálanum.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekniska stjóra, ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa á 315160.

**Umsóknir**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. mars 2002.
Viðmerk á brævbjálvan "arkitektur".

SNARSKIVAN



**Sandoyar sýslu Javnaðarfelag**

hevur uppstillingarfund í Ungmannafelagshúsinum á Sandi hósdagin tann 7. mars 2002 kl 20.30

**Nevndin**



**Byggitilfar bíliga til sølu**

Kom og hjálp mær at rudda.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| t.d.: | 2″ x 6″ | 105 stk. | á | 3,0 m |
| | 2 1/2″ x 5″ | 146 stk. | á | 3,9 m |
| | 2″ x 4″ | 36 stk. | á | 3,9 m |
| | og mangt annað | | | |

Samlað tilboð ynskist

**Eiko S. Apol**
Tlf.: 311915



Í BÝIN
- HVØNN HÓSDAG